út at koyra



Civic facelift

Honda Civic kemur næsta ár vi› eini facelift, bæ›i í Sedan og Coupé útgávuni.

Kelda: FDM/Motor

Street Ka

Væntandi kemur ein Ford Street Ka í 2002, i› er ein roadster til tveir persónar.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Seinka›ur Tino

Tino, sum er fyrsti MPV bilur hjá Nissan, i› skuldi koma til Danmarkar í september, kemur ikki fyrr enn fyrst í 2001.

Kelda: Bilen Motor & Sport

RUF hevjar seg yvir fer›sluni í b‡unum

MAGNUS GUNNARSSON

Tann alsamt vaksandi fer›slan í stórb‡unum er vor›in ein stórur trupulleiki hjá íbúgvunum. Ta› at skula koyra í tímalongum bí›irø›um inn í b‡in, fyri sí›an at leita sær eftir parkeringsplássi, ger at ta› tekur alt ov langa tí› at koma til arbei›is. Hetta hevur sett fer› á hugflogi› hjá fleiri uppfinnarum, men RUF ætlanin er tann nærmasta veruleikanum, vi› umhvørvisvinarligum el-bilum, sum bæ›i koyra á vegunum, og á skinnarum, og eisini hevja seg yvir fer›sluni í b‡unum.

Keypmannahavn sum fyrimynd

Danski civilverkfrø›ingurin og uppfinnarin Palle R. Jensen, hevur sett sær fyri at loysa trupulleikan vi› tí alsamt vaksandi fer›sluni um allan heimin. Sí›an fyrst í 90-unum hevur hann veri› á fleiri altjó›a rá›stevnum og lagt fram sína loysn á fer›slutrupulleikunum vi› RUF verkætlanin, i› er eitt alternativ til bil og tokfer›slu, og hevur flutningsfyrimunirnar hjá bá›um.

Ætlanin hjá Palle R. Jensen er at gera Keypmannahavn til eina fyrimynd hjá ø›rum b‡um, hvat fer›slu vi›víkur. So gott sum øll fer›slan í mi›b‡num skal vera vi› súkklum ella elektriskum akførum, sum einans brúka battaríír, i› skulu lø›ast upp, og koyra á skinnarunum.



Teldumynd sum vísir framtí›ardreymin hjá Palle R. Jensen. RUF bilarnir koyra á vegunum, ella ver›a hevja›ir høgt yvir a›rari fer›slu

Áhugi í USA

Í fleiri stórb‡um ver›ur nógv gjørt fyri at loysa fer›slutrupulleikarnar, eitt nú vi› tokvognum uttan førara, i› koyra á lukka›um skinnaraskipanum. Men frælsi› manglar í øllum hesum skipanum, sigur Palle R.Jensen, í mótsetning til RUF skipanina, sum eisini kann koyra á vanligu vegunum, og frá hur› til hur›, me›an vegastrekkini inn í b‡irnar ver›a koyrd á skinnarum.

Fer›slumynduleikarnir í Los Angeles í USA, hava víst RUF skipanini stóran áhuga.

Har ver›ur rokna› vi›, at tey næstu 20 árini fara 3 milliónir fólk at flyta til b‡in, og ta› fer at hava vi› sær, at fer›in á motorvegunum ver›ur skerd ni›ur í helvt. Hóast teir hava eina ætlan, sum kostar 70 milliardir dollarar, ver›a trupulleikarnir ikki loystir til fulnar. Vi› RUF ætlanini kunnu teir fyri 9 milliardir dollarar, gera eina effektiva og li›iliga skipan. Men amerikanarnir vilja síggja skipanina, tá hon er heilt li›ug, á›renn teir taka endaliga stø›u til RUF.

RUF International

Í 1994 bleiv RUF International stovna› sum ein handilsfelagskapur vi› Palle R. Jensen og rá›gevandi verkfrø›ingafyritøkuni Mogens Balslev A/S, sum eisini stendur fyri fíggingini av verkætlanini.



Her sæst hvussu skinnarabreytin passar inn í RUF bilin



Civilverkfrø›ingurin og uppfinnarin Palle R. Jensen, er ma›urin aftanfyri RUF verkætlanina. Hann er so sannførdur um hesa framtí›ar flutningsskipan, at hann eisini hevur sannført bæ›i danskar politikarar og vinnulívi›, eins og stórb‡ir í USA og Europa bí›a spentir til skipanin ver›ur heilt klár



RUF-bilarnir eru komnir inn í mi›b‡in og koyra av skinnaranum vi› 30 km/t

Møguleiki er fyri at hava elegant design innanfyri RUF-standardin



Til ber at tilkalla ein Maxi-RUF vi› telefon ella um interneti›

út at koyra

Palle R. Jensen í eini RUF konstruktión vi› einum bla›i í hondini. Tølini á myndini vísa til frágrei›ingarnar úti í sí›unum. Fremst á myndini, sum nr. 6, sæst skinnarin sum bilurin koyrir eftir



Kaffi og lesa blø›ini á veg til arbei›is

MAGNUS GUNNARSSON

Navni› RUF stendur fyri Rapid Urban Flexible. Á donskum ber eisini til at siga »afsted i en ruf«, sum merkir, avsta› í ein fart.

Effektiv bremsuskipan

RUF bilarnir ver›a løddir upp me›an teir koyra á skinnarunum, og kunna koyra í minsta lagi 50 kilometrar uppá eina lø›ing uttan fyri skinnararnar. Trygdin í RUF skipanini kemur millum anna› av teimum effektivu bremsunum, sum kleima fast um tann sera stútta tríhyrnta skinnaran. Hetta gevur eina óvanliga gó›a bremsukraft, sammett vi› bilar og tokvognar, i› vit kenna í dag.

200 km/t inn í b‡in

Me›an vanligir bilar kunnu koyra vi› 80 km/t, kann ein rø› vi› samanskoyttum RUF bilum koyra framvi› á skinnarum vi› 200 km/t. Ávegis kann bilførarin opna e-mail á innbygdu telduni, lesa blø›ini ella fáa sær kaffi á veg til arbei›is. Tá bilurin er komin inn í mi›b‡in, fer hann av skinnaranum vi› 30 km/t, fult uppløddur og klárur til tann seinasta partin av túrinum. Ein annar møguleiki er, at tey, sum hava vanligan bil koyra til eitt parkeringspláss naka› uttan fyri b‡in, har tey ver›a heinta› av einum Maxi-RUF, sum sí›an koyrir eftir eini skinnarabreyt uppi yvir fer›sluni inn í b‡in. Har sum skinnararnir enda, koyrir Maxi RUF sum ein sporvognur eftir magnetstrípum á vegnum.

Gó›kendan einarætt

Palle R. Jensen sigur, at ongin annar kann arbei›a vi› eini tilsvarandi skipan. So hvørt sum n‡ggjar loysnir koma fram, fáa teir einarættin gó›kendan, so ongin annar í útheiminum skal fáa æruna ella vinningin fyri uppfinningarnar hjá teimum í Ballerup. Uppbyggingin av RUF skipanini fer fram sum menning av einum gó›kendum standardi, sum áhuga› í útlandinum kunnu fáa licens uppá frá RUF International. Til dømis kann Los Angeles fáa loyvi at byggja eina høga skinnarabreyt fyri at lætta um teirra stóru fer›slutrupulleikar, og brúka teirra egnu arbei›smegi til ta›.

Umhvørvi› stóri vinnarin

Á eini rá›stevnu á Rá›húsinum í Keypmannahavn vísti Palle R. Jensen á, at umframt ta› at RUF skipanin ger tann dagliga flutningin fyri tann einstaka borgaran lættari, ver›ur umhvørvi› tann stóri vinnarin. RUF er eitt kappingarført fíggjarligt alternativ til ta› at gera motorvegir, útvega bilar, bussar og tokvognar. Ein 200 m long royndarbreyt er gjørd á Ingeniørskúlanum í Ballerup, og tí›indafólk vór›u bo›in til frumframførslu av tí teir kalla »Det danske bud på fremtidens trafiksystem«. RUF skipanin var› eisini víst fram á »Miljøfestivalen 2000« i› var í Keypmannahavn frá 6.-10. juni.

Einafer› í framtí›ini fara tey, sum koma til Havnar at arbei›a, møguliga at parkera onkusta›ni í Hoyvíkshaganum, og koyra vi› einum Maxi RUF oman í b‡in.

Kelda: FDM

Tey sum hava vanligan bil, kunnu koyra til eitt parkeringspláss uttanfyri b‡in, har tey ver›a heinta›i av einum Maxi-RUF

RUF bilar á skinnara eru settir inn í eina mynd av motorvegnum í Lyngby vi› f‡ra breytum. Hetta er fyri at vísa á at me›an vanligir bilar bert hava loyvi at koyra upp til 80 km/t, strúka nakrir RUF bilar framvi›, vi› eini fer› uppá 200 km/t